## DAGSINS MEINING

# Ábyrgdarbýtið millum land og kommmunur

Vit síggja í hesum døgum, at samgongan hevur ein politikk, ið miðar eftir at leggja so nógv sum møguligt út til kommunurnar at umsita. Summar kommunur eru ivaleyst førar fyri at umsita nógv, og helst meir enn tær gera í løtuni, meðan aðrar ikki makta meir, enn tað tær umsita í løtuni. Kanska kunnu størri kommunalar eindir bøta um hetta, men hvussu er við pengunum?

Í farnu viku sást, at sama landsstýri, ið vil leggja meiri ábyrgd á kommunurnar, ikki hevur so frægt álit á kommunalar felagsskapir, at hesir kunnu samráðast um løn sjálvir. Hvat Karsten Hansen hevur hugsað fyri sær vita vit ikki, men hansara sýtan at góðkenna SEV sáttmálan ber ikki boð um økt kommunalt sjálvstýri. Hyggja vit at orðunum hjá Høgna Hoydal og halda tey ímóti gerð Karsten Hansens, so mugu vit bert konstatera, at orð og gerningar ikki hanga saman.

Hví er so umráðandi at leggja meir út til kommunurnar at umsita? Tað má ikki verða so, at landsstýrið, fyri at lætta um á fíggjarlógini, turkar alla fíggjarliga ábyrgd á kommunurnar. Tað má heldur ikki verða so, at landspolitikarar kunnu sleppa at skáka sær undan ábyrgd við at siga, at hetta og hatta er ein kommunalur trupulleiki. Hetta hava vit mangan sæð í spurninginum um barnaansing. Barnaansing er ikki bert ein kommunalur trupulleiki. Um barnaansingin ikki er nøktandi, so kostar tað arbeiðsmarknaðinum og harvið samfelagnum pening, og tá er tað ein samfelagstrupulleiki, óansæð hvør ikki er sína uppgávu vaksin.

Tað verður tosað um, at kommunur skulu hava alla fíggjarligu ábyrgdina av fólkaskúlanum. Fólkaskúlin verður ongantíð bert ein kommunalur trupulleiki, tí um hann ikki riggar, ja so missir alt samfelagið sum heild, og harvið er tað ein landspolitisk ábyrgd, hvussu enn víkir og vendir. Eisini má landið broyta skipanina við kommunala íløgukarminum, um smærru kommunurnar skulu hava nakran livandi kjans at lyfta nakrar uppgávur í samband við fólkaskúlan, og so leingi hetta ikki hendir, so verður neyvan talan um flyting av stórvegis ábyrgd. Ikki um talan er um eina ábyrgdarfulla samgongu.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Profetisk tala

**Eilif Samuelsen**



Føroya Lærarafelag hevði sín árliga aðalfund seinasta leygardag. Eftir at hava verið á nærum hvørjum fundi síðani 1958 bar mær ikki til at vera á fundinum hesaferð, men í Sosialinum týsdagin stóð at lesa røðan, sum landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum, Høgni Hoydal, helt á fundinum.

Eftir í innganginum at hava lifrað hóskandi fyri lærarafjøldini, loyvir hann sær at siga sína erligu hugsan um fólkaskúlan. Bæði um ítøkilig viðurskifti og um tær politisku visiónirnar frameftir, og at tær sjálvandi fara at vera merktar av hansara politisku sannføring, altso, hetta verður ein politisk tala.

Høvuðsboðskapurin er, at vit hava ein danskan skúla, og at vit mugu stríðast fyri at fáa ein føroyskan skúla. Hetta er ein mantra, sum vit hava fingið tútað oyruni full av frá fyrst og fremst tjóðveldisfólki eina hálva øld. Men alla hesa hálva øldina hava tey ikki megnað at koma við nakrari ítøkiligari atgerð ella nøkrum ítøkiligum konstruktivum hugskoti, sum var øðrvísi enn tey, sum í dag hava hevjað føroyska fólkaskúlan og føroyska skúlaverkið sum heild upp í tær hæddir, har tað í dag er. Og hyggja vit at førleikanum hjá føroyska fólkinum í dag, og sum fólkið hevur ognað sær við at ganga í føroyskar skúlar, sum eru riknir eftir føroyskum lógum, sum vit føroyingar hava gjørt, so eru tey flestu á einum máli um, at hóast alt kann gerast betri so við og við, so stendur ikki so heilt illa til kortini.

### Hvat skapar positivan anda?

Landsstýrismaðurin gremur seg um, at viðurskiftini rundan um skúlan hava verið merkt av einum negativum anda. Er tað veruliga ikki gingið upp fyri honum, at hann sjálvur hesi seinastu fimm gullárini hevur sitið við lyklinum til at skapa fólkaskúlanum betri materiellar umstøður, so hann kann koma at standa í einum meira positivum ljósi?

At Lærarafelagið hevur verið ónøgt hesi árini síðani kreppuna fyrst í nítiárunum, tá ið lønirnar vórðu skerdar við yvir 8 %, og at felagið hevur brúkt megin-partin av síni orku síðani uppá at fáa lønirnar uppaftur, er lítið at undrast á. Ónøgdin stavar ikki so nógv frá teimum vanligu lønarsamráðingunum um generellar lønarhækkingar, men um at felagið eisini skuldi kempa fyri at fáa ta lovaðu normaliseringina av teimum 8 %, sum bita fyri bita máaði av teimum generellu lønarhækkingunum og teimum serligu krøvunum, sum altíð eru ein partur av lønarsamráðingunum.

Landsstýrið frá 1994-98 kom til eitt samfelag, sum júst hevði verið og lutvíst framvegis var í djúpari búskaparkreppu. Og í tí framhaldandi endurreisingararbeiðinum vóru umstøðurnar at veita fíggjarligar kompensatiónir sera avmarkaðar, hóast hugurin var góður, ja, við hvørt so góður, at tað stóðust álvarsligar frustratiónir burturúr. Støðufestið gjørdi, at allar strikur í diagrammunum hjá búskaparfrøðingunum, sum ynskiligt var skuldu ganga á skák uppeftir, fóru at venda tann vegin, og tað hava tær gingið til nú.

Tað landsstýrið fekk samtykt eina heilt nýggja fólkaskúlalóg, sum setti í verk nógv nýskapandi, sum hevur sett rættiliga ferð á pedagogisku menningina í fólkaskúlanum. Landsstýrismaðurin gramdi seg í røðuni um, at tað hevði verið so nógv stríð hjá politiska myndugleikanum um frymlar og prosentir og promillur og niðurskurðir og krónur og oyru. Sjálvandi mátti tað verið øllum greitt, at ein nýggj fólkaskúlalóg, sum hevur umfatandi nýskapanir við sær, og sum er framtíðarlítandi, fer at útloysa krøv frá avvarðandi fakfelag um mótvirði fyri økta arbeiðsbyrði.

Hetta eru krøv, sum eru rættvís og sum fíggjarmálastýrið og felagið mugu samráða seg fram til semju um.

Komið og stríðist um framtíðina eitur ein yvirskriftin í røðuni. Beinanvegin fara vit at hugsa um ta manipulerandi áeggjanina frá seinasta fullveldisvalstríði: Komið og byggi land! Hvør skal siga, vit fullveldisfólk byggja land. Øll hini, sum ikki hoyra upp í tann hópin byggja ikki land, ergo svíkja tey sítt land.

Hvat er tað so, landsstýrismaðurin bjóðar til? Jú, nú má tað vera innihaldið, menningin, atgerðarætlanin og krøvini til okkum sjálv, sum vit skulu brúka orkuna til.

Tað tykist, sum landsstýrismaðurin hevur lítla hóming av, hvat ið er farið fram, og hvat ið framvegis fer fram í fólkaskúlanum. Ongantíð í føroyskari skúlasøgu hevur so nógv fundarvirksemi og so nógv orðaskifti verið millum lærarar um júst innihald, menning og ráðlegging, sum hesa tíðina, síðani nýggja skúlalógin kom í gildi. Hetta orðaskifti og fundarvirksemi hevur júst verið grundarlagið undir teimum krøvunum um kompensatión fyri økta arbeiðsbyrði og ynskinum um ein nýggjan arbeiðstíðarnorm, sum arbeitt hevur verið við síðan 1996.

### Ov seinur á sjóvarfallinum

Landsstýrismaðurin sigur, at málið fyri at menna ein føroyskan skúla liggur í at hava minni sentralstýring og at sleppa undan einum stívum bygnaði, har øll orkan fer til at tosa um smálutir og prosent og niðurskurð.

Hertil er at siga, at tað sum Lærarafelagið fyrst og fremst tosar við landsstýrið um, tað eru lønar- og onnur tænastuviðurskifti. Hetta er høvuðsuppgávan hjá einum fakfelag. Haraftrat hevur Lærarafelagið frá byrjanini lagt stóran dent á eina aðra uppgávu, og tað er tann pedagogiska, har felagið gjøgnum tíðirnar hevur havt týðandi ávirkan á allar lógir og aðrar reglugerðir, og gjøgnum Lesiætlanarnevndina, seinni Ráðleggingarnevndina, hevur felagið kanaliserað niðurstøðurnar frá tí støðuga orðaskiftinum um menning fólkaskúlans til leiðbeinandi lesiætlanir og regluverk annars.

Nýggja fólkaskúlalógin stovnsetti skúlastýri, júst fyri at desentralisera stýringina av skúlunum, størri ábyrgd varð løgd á skúlaleiðslurnar, og í § 3 í skúlalógini fær tann einstaki skúlin sjálvur ábyrgdina fyri undirvísingardygdini, og skúlin ger sjálvur av, hvussu hann skipar og leggur sína undirvísing til rættis. So landsstýrismaðurin er eitt sindur seinur við sínum slóðbrótandi nýtonkum.

Burtursæð frá, at nú skulu lærarar í framtíðini ikki seta krøv til myndugleikarnar, men til sín sjálvs, so er einasta nýhugsanin, sum eg dugi at fáa eyga á, tá ið hann sigur, at í framtíðini skulu sáttmálasamráðingarnar snúgva seg um innihaldið og virðið í undirvísingini, heldur enn um arbeiðstíð og niðurskurðir.

Hvat man Føroya Lærarafelag halda um, at tað nú verður slutt við at samráðast um lønar- og arbeiðsviðurskifti, men í staðin at kempast má fyri at sleppa at menna innihaldið og virðið í undirvísingini?

Er hetta profetisk tala um Føroyar í framtíðini?


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Fólkaflokkurin og sáttmálasamráðingar

Til:
Verkamannafeløgini
Att. Ingeborg Vinther,
form., FA
Tjarnadeild 5, Tórshavn

**Viðv. skrivi tykkara til m.a. Fólkaflokkin 6. mai 2003.**



Fólkaflokkurin takkar fyri bræv tykkara í gjár og tekur fult undir við, at í einum fólkastýrdum landi sum Føroyum við fríu marknaðarbúskapi hava partarnir á arbeiðsmarknaðinum fullan og heilan rætt til at samráða seg fram til setanar- og lønaravtalur.

Samstundis ásanna vit, at lógin, sum SEV virkar undir, áleggur landsstýrismanninum í fíggjarmálum og ongum øðrum at samtykkja ella havna teimum lønaravtalum, sum elfelagið ger við síni starvsfólk.

Annars ynskir Fólkaflokkurin øllum tykkum, sum samráðast, gott samráðingarhegni, eitt friðarligt vár og góðar avtalur, sum tæna øllum Føroya fólki til gagns og sóma.

Vinarliga

**Óli Breckmann,**
**v/ tingbólkin**

# Akkurát nokk til avdráttir

**Magni Laksáfoss**



Landskassaroknskapurin fyri fíggjarárið 2002 vísti eitt avlop á 191 mill. áðrenn avdráttir – ella knappar 50 mill. eftir avdráttir. Hetta er nógvur peningur, men als ikki nokk í einum so avbera góðum ári, sum 2002 vísti seg at vera. Avlopið átti verði minst 200 - 300 mill. eftir avdráttir og ikki einans 50 mill.

Útlitini fyri 2003 eru munandi verri enn fyri 2002. Væntandi verður onki avlop í ár.

Tá fíggjarlógin fyri 2002 varð samtykt vísti hon eitt avlop á 371 mill. Í leypi av 2002 komu nógvar eykajáttarnir, so vegna vánaligari stýring kom avlopið við eykajáttanum niður á 70 mill. í desember 2002. Endaliga roknskaparúrslitið vísti seg at liggja á 191 mill. – heilar 180 mill. lægri enn upprunaliga fíggjarlógin.

Tá skal eisini takast hædd fyri, at fleiri óvæntaðar inntøkur vístu seg í síðstu løtu, sum vóru við til at lyfta úrslitið uppeftir.

### Akkurát nokk til avdráttir

Longu tá valið var á vári 2002 vísti Sambandsflokkurin á, at tað var um reppið at fíggjarlógin fór at hava nóg stórt avlop til avdráttirnar.

Tá avtornaði vísti tað seg, at tað akkurát var nokk til avdráttirnar. Knappar 50 mill. vóru eftir tá avdráttirnir vóru goldnir.

Sanniliga mugu vit siga, at gott var at eyka inntøkur komu í síðstu løtu, sum góvu eitt avlop á landskassaroknskapinum.

Tær knappar 50 mill. eru settar inn í Landsbankan.

### Peningurin í Landsbankanum

Landskassin hevur lógarbundna skyldug at hava 15% av BTÚ innistandandi í Landsbankanum. Av tí at búskaparvøkstur hevur verið seinastu árini (og harvið er BTÚ vaksið) er hetta kravið vaksið við 130 mill., soleiðis at tað í dag skulu standa minst 1.515 mill. í Landsbankanum. Samstundis eru einans 50 mill. settar inn í bankan – tvs. at tøki peningurin í Landsbankanum er ikki vaksin men minkaður við (130-50 = 80 mill )

Tilsaman er nú minni enn 900 mill. tøkar í Landsbankanum – restin er peningur, sum landskassin hevur bundið seg til at hava innistandandi.

Kravið næsta ár veksur við umleið 150 mill. – tvs. at avlopið á fíggjarlógini í ár má vera minst 300 mill. fyri at vera nokk til avdráttir og til at økja tøka peningin í Landsbankanum.

### Útlitini fyri 2003

Fíggjarlógin fyri 2003 varð samtykt á heystið 2002 við einum avlopi á 240 mill. Tvs. at samtykta avlopið er ikki nokk til avdráttir og til at nøkta kravið um innistandandi í Landsbankanum.

Longu nú eru eykajáttarnir fyri omanfyri 70 mill. samtyktar í løgtinginum. Tvs. at longu nú er avlopið á fíggjarlógini við at nærkast 160 mill., sum júst er nokk til avdráttirnar av skuldini (gjaldast skulu 148 mill. í avdráttum í 2003)

Harafturat er inntøkusíðan á fíggjarlógini yvirmett. T.d. er mett at skattainntøkurnar vaksa meiri enn 9 pct. meðan vøksturin í skattainntøkum higartil í ár hevur verið 3,7% í mun til sama tíðarskeið undanfarna ár - tá er hædd ikki tikin fyri skattalættanum og møguligum avleiðingum av verkfallinum. Samtykti skattalættin er 3,4% av skattainntøkunum, so í veruleikanum er vøksturin einans 0,3% higartil í ár. Eyðsæð er, at inntøkur koma at mangla í ár.

### Landskassaavlopið 2003

Sum grundgivið er fyri omanfyri, kann ikki roknast við at yvirskotið á landskassanum verður nøktandi. Roknast kann við, at úrslitið á Landskassanum verður munandi verri enn í 2002 – hóast tekin eru um at 2003 eisini fer at vera eitt rímiliga gott ár - búskaparliga sæð.

Man skal vera superoptimist, um man roknar við at avlopið verður stórt nokk til avdráttirnar. Eg vildi heldur mett, at avlopið fer at liggja millum eitt hall á 100 mill. til eitt avlop á 100 mill – alt eftir hvussu restin av árinum fer at laga seg.

# Húsdýravælferð

**Gunnar Bjarnason**
*landbúnaðarfrøðingur*

Hvønn leygardag hevur Sosialurin eitt blað innlagt, "Vikuskiftið". Tað er ætlað til undirhalds- og hugnalesnað um vikuskiftið.

Eg plagi stundum víð áhuga at lesa hetta blaðið, og tað gjørdi eg eisini 26. apríl 2003.

Síða 3 var ikki øll hugnalesnaður. Har stóð frásøgn um nakrar manns, sum hava veðrar í eini skor. Teirra meðaltøl vísa, at 25% av veðrunum koma ikki aftur, og tað var ikki gamansleikur at fáa seyðin í skorina, hvørki fyri fólk ella fæ.

Tað eru aðrar skorar, har veðrar verða latnir niður í, har úrslitið og viðurskiftini eru á sama støði, so hasir skulu ikki dømast av mær, meira enn aðrir. Viðurskiftini í nógvum høgum eru ikki stórt betur, sjálvt um seyðurin ikki dettur oman, og støðan er ikki tespulig á øllum traðunum við seyði.

Tað at ein skor kastar 25% av veðrunum av sær, mann hava sína grundir. Tað at lombini úr nógvum høgum mest sum ongantíð koma uppum 30 pund hevur eisini sínar grundir.

Vit hava ein sokallaða djóraverndarlóg, sum eins tað sama kann takast av aftur. Eftir øllum at døma virkar hon meira sum ein lóg at tryggja, at eingin sum hevur ábyrgd av húsdýrum, skal kunna dømast fyri misrøkt av húsdýrum. Hon stuðular í hvussu ikki er undir at betra um røktina av húsdýrunum.

Eg spyrji bara, hvar er markið hjá okkum føroyingum fyri misrøkt av seyði og húsdýrum?

Eingin undrast yvir mátan vit hava seyð og húsdýr uppá í Føroyum. Fjølmiðlarnir skriva bara um hugna, mentan, og um friðaligt og góðsligt bygdalív. Tað er ofta langt millum tað bløðini skriva, og tað, sum verðuliga gongur fyri seg við húsdýrum. Loftmiðlarir eru einki petti betur enn skrivaðu miðlarnir at romatisera "føroyska" seyðahaldið út um alt mark.

Tað fellur eftir øllum at døma fjølmiðlunum sera tungt at viðgera tyngjandi viðurskifti "hjá tí vanliga manninum".

Er tíðin ikki komin til at vit fara at broyta hugburð um hvussu vit hava húsdýrini, ikki minst seyðin?

Seyðurin í yvirskipaðu høgunum hevur tað ikki gott nú lombini koma, og veðrarnir í hasi skorðini hava tað neyvan hugnaligt frá nú av, og til teir verða svavdir í heyst, ella til 4. hvør teirra liggur sundirbrotin á onkrari hellu.

# Jú, lættast var at kasta frá sær!

**Bjørn Patursson**
*form. Bóndafelag Føroya*



**Bæði lógaruppskotini: Lóg um Búnaðargrunn og broytingarnar til lóg um landsjørð vóru send aftur til landsstýrismannin frá vinnunevnd løgtingsins.**

Tygnarlig og tolin fólk sum starvast innan umsitingina í landbúnaðin siga, sum við ein munn, hetta var seinstu ferð, nú kunnu politikararnir sjálvir gera síni uppskot um teir ynskja broytingar, vit finna okkum ikki í at verða hildin fyri tað turra spott ferð eftir ferð! Tá tað snýr seg um landbúnað og serstakliga festijørð ber einki til, alt verður bókstaviliga kasta aftur í høvdið á landsstýrismanninum. Soleiðis hevur verið og soleiðis var eisini á hesum sinni.

Landsstýrismaðurin Bjarni Djurholm hevur víst vilja at gera batar. Men landsins hægsta vald løgtingslimir eru fulkomiliga líkasæl um støðu landbúnaðarins, sjálvt um teirra egnu grannskoðarar vísa á tað pínligu støðu festijørðin virkar undir. Sum vant verða lovorð søgd og skriva og í samgonguskjalinum stendur beinleiðis at støðan hjá festibóndunum skal betrast. Men so skjótt atkvøðurnar eru taldar hendur einki meir. Uppskot sum koma fyri løgtingið um landsjørð verða súlta við barnsligum undanførslum, løgtingið tekur avgerðir í óðum verki uttan at hugsa um fylgjurnar. Arbeiðið er so illa lagt til rættis at nevndirnar eru stressaðar. Tað einasta sum fær viðgerð og undirtøku eru eftir hondini uppskot um at egna sær sjálvum meir løn og pensión. Sjálvt Tjóðveldisflokkurin sum bæði í skrivt og talu lovar bót og bata, eins og stendur fyri sjálvbjargni, stendur sum kálvur í flóðri tá møguleikin býst. Tíðin verður heldur brúkt á danatingi, til klandur um persónlig áhugamál og um hvat grót skal fyllast í hvat grótkast. Nei við so vánaligum politikarum skulu vit ikki rokna við at byggja nakað land!

Nevndir við serfrøðingum hava gjørt álit aftaná álit, broytingar aftaná broytinar, uppfylt ynski eftir ynski, -frá politisku flokkumum, tað manglar bara at standa á høvdinum á tinghúsvøllinum. Umboð fyri vinnuna, ráðgevarar og serfrøðingar hava verið á fundi eftir fund, skriva síður upp og síður niður, men eftir øllum at døma so hirða tey sum skulu taka avgerðirnar ikki so frætt sum at seta seg inn í málini. Nú skuldu so øll hesi fólkini brádliga í summarfríð, bestu ársins tíð, og so var bert at finna uppá onkra lunkaða undanførslu og blaka landsstýrismanninum uppskotini aftur. Sera sera skuffandi og mótfallandi. Úrslitið er at myndugleikans egnu fólk nú siga sum við ein munn at nú er nokk!

Nevndin í Bóndafelagnum hevur ikki endaliga viðgjørt málið, men felagsins evsta mál er at betra um karmarnar hjá bóndunum. Ikki kann hugsast, at nevndin tekur avgerð um at kasta frá sær so lætt. Felagið hevur miðvíst arbeitt við at betra um kor vinnunar hesi 45 árini felagið hevur á baki og tað hevur nokk ongantíð verið so nógv brúk fyri einum aktivum fakfelag sum júst nú. Formaðurin ferð at seta seg í samband við landsstýrismannin fyri at vita hvørja støðu hann hevur til málið og hvørjar ætlanir landsstýrismaðurin hevur. Tingið kemur saman aftur á Ólavsøku og hendan fagra vár –og summartíðin gongur skjótt.